# Píkadekk eru óneyðug

**Aftur í ár er veturin komin við kulda og kava, og fuglalátið er skift út við knasið frá píkum ímóti asfalti. Enn einaferð verða hjólskiftarnir spurdir, hvat teir halda um dekk, og í ár vórðu enntá landsverkfrøðingurin og landsstýrismaðurin í vinnumálum spurdir um, hvat teir halda um píkadekk og "heilársdekk". Allir hesir menn halda, meina og meta um, hvat ið er betri, men eingin teirra leggur nøkur fakta á borðið. Vit halda, at hetta orðaskiftið er alt ov grunnt og hava tí sett úrslitini frá trimum dekkroyndum saman, íalt 42 dekk, og niðurstøðan er greið: Píkadekk eru ikki neyðug longur.**



Hans Blaasvær

Bara tað at teir brúka orðið "heilársdekk" um vetrardekk vísir, hvussu lítið skil teir hava fyri hesum. "Heilársdekk" er brong úr tí danska orðinum "helårsdæk", og er eitt dekkslag sum kann brúkast alt árið. Bert nøkur fá dekk av hesum slagnum verða gjørd, t.d. Goodyear Vector, og eyðkennið fyri hesi dekkini er, at tey hvørki eru góð um veturin ella summarið, og tí eru tey bert brúkilig til býarkoyring.

Hendan greinin er um vetrardekk við ella við ongum píkum, sum eru M+S merkt. M+S merkir Mud and Snow. Hesi dekkini eiga bert at verða brúkt um veturin, og hvørki við ella við ongum píkum eru tey serliga góð á turrum ella vátum asfalti. Hinvegin eru tey sera góð á kava og gleri, og so nógv betri enn summardekk, at tað átti at verið lógarkravt´, at bilurin er skøddur við vetrardekkum, tá ið hálka er.

Í sendingini "Breddin" 30/10-03 kom fram, at ein kunngerð er á veg, sum avmarkar tal, vekt og hvussu langt píkarnir stinga út. Landsverkfrøðingur segði, at kanningar vístu, at talið av píkum ikki ávirkaði, hvussu góð dekkini vóru í hálku, og at færri og léttari píkar næstan ikki slitu asfaltið, tá ið tátt var. Um hetta veruliga var galdandi, so var bert neyðugt við *einum* píki í hvørjum dekki, men tað ber sjálvandi ikki til. Nógvir tungir píkar, sum stinga langt út, virka nógv best, og við kunngerðini, sum er á veg, vera píkarnir so lítlir og fáir at teir gera næstan ongan mun. Væntandi líkist komandi kunngerðin teimum í Noreg og Svøríki, sum píkadekkini, ið verða viðgjørd í hesari greini uppfylla. M.a. eru upp til 110 píkar loyvdir í 15" dekkum, viga teir í mesta lagi 1,1g og stinga í mesta lagi 1,2mm út[1]. Til samanberingar sigur verandi føroyska kunngerðin, at píkarnir kunnu viga 3g og talið í 15" dekkum er upp til 150[2].

Nógvir ymiskir faktorar ávirka dekkeginleikarnar, sum t.d., hvussu kalt tað er, slag av bili, dekkstødd og framleiðsluár, og saman við at ymiskur dentur verður lagdur á ymiskar eginleikar, ger at tað sama dekkið kann verða skírt vinnari í einum blaði, og vandamikið av einum øðrum. Eitt gott dømi er Goodyear Ultragrip 6, sum vann kappingina hjá ADAC[3] og FDM[4] og dumpaði, tá Aftonbladet[5] royndi tað. Orsøkin var, at týskarar og danir løgdu stóran dent á eginleikar á vátum vegi, og sviar løgdu størstan dentin á kava- og íseginleikar. Tí hava vit her valt bert at hyggja eftir, hvussu væl dekkini bremsa og trekkja, og ikki geva karakter, men vísa tey veruligi úrslitini.

Í Føroyum er bert loyvt at koyra við píkadekkum frá 16/10 til 30/4, og við hvørt ljóðar tað sum um tað er eitt krav, at píkadekkini skulu vera undir alt hetta tíðarskeiðið, hóast sólin skínur oman og niðan. Til dømis var hitin 17 stig í Tórshavn 17/4 í ár, og síðsti frostdagurin var 4. februar. Hóast tað vóru fleiri sum koyrdu við píkadekkum, ímeðan onnur gingu við sólbrillum og í stuttum buksum. Tá var tað eisini, at ein politikkari fekk tað "gløgga" hugskotið, at løgreglan hvørt ár skuldi avgera, nær píkadekkini skuldu av. Tíverri er tað soleiðis í tí veruliga lívini, at eingin klárar at spáa um veðrið longur enn uml. 5 dagar fram, og um onkur í februar hevði klárað at spátt, at hitin fór at verða 17 stig hálvan apríl í ár, so hevði hann fingið arbeiði í Pentagon.

Reglurnar fyri londini á meginlandinum eru[6]:

**Noreg**: Bilurin skal vera skøddur til undirlagið, og løgreglan kann geva bót, um tað verður mett at dekkini ikki eru egnað. Píkadekk eru bert loyvd frá 1. november til 12. apríl. Fyri Norðurnoreg eru reglurnar eitt sindur øðrvísi.
**Svøríki:** Frá 1. desember til 31. mars er tað lógarkravt at brúka vetrardekk við ella við ongum píkum. Píkar eru loyvdir frá 1. oktober til 30. apríl
**Danmark:** Píkar eru loyvdir frá 1.november til 15. apríl.
**Finnland:** Frá 1. desember til 29. februar er tað lógarkravt at brúka vetrardekk við ella við ongum píkum. Píkar eru loyvdir frá 1. november til 12. apríl.
**Týskland:** Píkadekk eru ikki loyvd

Legg til merkis, at tíðarskeiðið við píkum í Føroyum er tað næst longsta, hóast okkara veðurlag hevur fáar frostdagar og nógv regn, samanborið við Noreg, Svøríki og Finnland.

Í Noregi eru ymiskar royndir at avmarka píkanýtsluna gjørdar í t.d. Oslo og Trondheim við at leggja avgjald á píkadekkini, ella Drammen[7] har bileigarar fingu kr. 250,- fyri hvørt píkadekkið, sum var skift út við eitt píkafrítt vetrardekk. Endamálið við píkagjaldinum í Oslo var at avmarka píkanýtsluna til 20% av bilunum, og tað varð rokkið í 2001[8] og tí var píkaavgjaldið avtikið. Í Breddanum 30/10 varð sagt, at avgjaldið varð avtikið vegna ov nógvar vanlukkur, men hetta er ikki rætt, og av tí at alt fleiri eru farin at koyra við píkum í Oslo aftaná avgjaldið varð avtikið, so er ætlanin at seta hesa skipan í verk aftur í 2004[9].

| | Bremsilongd frá | 50km/t Kavi | 50 km/t Ísur | nr | 60 km/t Vátt asfalt | nr |
|---|---|---|---|---|---|---|
| F | **Pirelli Winter Carving*** | 19 | 42 | 5 | 23 | 24 |
| F | **Goodyear Ultra Grip 500*** | 20 | 39 | 1 | 24 | 38 |
| S | Nokian Hakkapeliitta Q | 20 | 53 | 17 | 24 | 40 |
| S | Continental Maxi Ice | 20 | 60 | 25 | 21 | 14 |
| F | **Michelin Ivalo*** | 21 | 42 | 6 | 23 | 30 |
| S | **Goodyear Ultra Grip 500*** | 21 | 43 | 9 | 23 | 32 |
| F | Gislaved SoftFrost 2 | 21 | 58 | 21 | 23 | 35 |
| F | Continental Conti Viking 3 | 21 | 59 | 23 | 23 | 28 |
| S | Bridgestone Blizzak WS-50 | 21 | 54 | 18 | 23 | 27 |
| F | Pirelli Icesport | 21 | 61 | 26 | 24 | 36 |
| F | Bridgestone Blizzak WS-50 | 21 | 61 | 27 | 24 | 37 |
| F | Nokian Hakkapeliitta Q | 21 | 52 | 16 | 27 | 42 |
| S | Agi Soft Sarek | 21 | 63 | 29 | 22 | 23 |
| F | Michelin Maxi Ice | 21 | 62 | 28 | 22 | 22 |
| S | **Nokian Hakkapeliitta 2*** | 21 | 42 | 7 | 23 | 31 |
| F | **Agi Sarek 2*** | 21 | 48 | 15 | 24 | 39 |
| S | Michelin Soft Frost | 21 | 60 | 24 | 21 | 16 |
| S | **Continental Winter Viking 1*** | 22 | 39 | 2 | 22 | 17 |
| S | **Michelin Ivalo*** | 22 | 41 | 4 | 22 | 19 |
| S | **Gislaved Nord Frost 3*** | 22 | 42 | 8 | 22 | 20 |
| F | **Uniroyal MS Plus Nordic*** | 22 | 43 | 10 | 23 | 33 |
| F | **Continental Winter Viking 1*** | 22 | 46 | 13 | 23 | 34 |
| F | **Nokian Hakkapeliitta 4*** | 22 | 40 | 3 | 23 | 29 |
| F | **Gislaved Nord Frost 3*** | 22 | 45 | 12 | 23 | 25 |
| F | **Bridgestone Noranza*** | 22 | 45 | 11 | 22 | 21 |
| S | **Aurora W403*** | 22 | 46 | 14 | 23 | 26 |
| S | **Agi Sarek 2*** | 23 | 55 | 19 | 20 | 13 |
| S | **Kumho KW-11*** | 23 | 56 | 20 | 22 | 18 |
| M | Dunlop SP Winter Sport M3** | 23 | | | 20 | 11 |
| M | Bridgestone Blizzak LM-22** | 23 | | | 19 | 3 |
| M | Pirelli Winter 210 Snowsport** | 23 | | | 20 | 10 |
| F | **Kumho KW-11*** | 23 | 58 | 22 | 24 | 41 |
| S | Goodyear Ultra Grip 6 | 23 | 67 | 30 | 18 | 2 |
| M | Goodyear Eagle Ultragrip GW-3** | 23 | | | 19 | 4 |
| M | Toyo Snowprox S50** | 23 | | | 20 | 12 |
| M | Fulda Kristall Supremo** | 23 | | | 19 | 7 |
| M | Arktic M790** | 23 | | | 21 | 15 |
| M | Vredestein Snowtrac 2** | 24 | | | 19 | 9 |
| M | Nokian WR** | 24 | | | 19 | 6 |
| M | Kumho Izen KW-17** | 24 | | | 19 | 5 |
| M | Continental Winter Contact TS790** | 24 | | | 19 | 8 |
| M | **Summardekk**** | 76 | | | 16 | 1 |

***Píkadekk**
**Stødd: 205/55-16, Øll hini eru 195/65-15
F: Fiat Stilo 1.300kg
M: Ford Mondeo 1.300kg
S: Saab 9000 1.600 kg




Men hvat siga testirnar? Vit hava savnað tølini frá trimum testum: Aftonbladet[10] og blaðið hjá NAF, sum eitur Motor[11] hava verið í Ivalo í Finlandi og royndakoyrt píka- og píkafrí vetrardekk, sum eru ætlað til veruligt vetrarveður. Aftonbladet hevur royndarkoyrt við einum Saab 9000 og Motor og hevur brúkt ein Fiat Stilo. Hetta gevur ymisk úrslit, hóast summi dekk eru tey somu, so bilurin ger eisini mun. Til samanberingar er ein test úr Auto Bild nr. 41 2003 tikin við, tí har eru tey dekksløgini við, sum vit kunnu keypa her. Hesar royndarkoyringarnar eru sera umfatandi, so lesið tær og fáið nógv meir at vita.

Tølini eru savnað í talvu 1, og tey eru raðfest eftir bremsilongd í kava, sum stendur í tí fyrsta teiginum, og tað besta dekkið er ovast. Tølini eru avrundað, so tey ikki hava desimalar, tí tað er lættari at lesa. Niðast er eitt summardekk tikið við til samanberingar, og tað er beinleiðis óhugnaligt at síggja, hvussu stórur munur er á vetrardekkum og summardekkum í kava. Bremsilongdin verður meir enn tríggjar ferðir so lang við summardekkum í kava. Burtursæð frá hesum er lítil munur á bremsilongdunum í kava við vetrardekkum á og ymisleikin kann samanberast við ymisleikan á ymiskum summardekkum á asfalti.

Næsti teigurin vísir bremsilongd á blankum, nýggjum ísi frá 50 km/t og "nr" teigurin vísir raðfylgjuna á ísi. Hendan royndin kann samanberast við at bremsa á svartakálki. Ymisleikin er eitt sindur størri, og píkadekkini liggja fremst. Hóast tað, so er tað besta píkafría dekki betri enn tað vánaligasta píkadekki. Verður tað besta píkadekki Goodyear Ultra Grip 500, samanborið við tað besta píkafría Nokian Hakkapeliitta Q, so eru bert 11 metrar á muni. Verður hetta rokna um til ferð, so hava dekkini somu bremsilongd, um Nokianførarin setur ferðina niður til 43 km/t. Við 80 km/t hevði bremsilongdin hjá Goodyear verið uml. 100 m og Nokian førarin hevði haft somu bremsilongd við uml. 70 km/t. So við at seta ferðina niður við 10 km/t eru píkadekk óneyðug í sambandi við bremsing. Samanumtikið eigur ferðin tó ongantíð at fara upp um 30 km/t, tá vegurin er glerfrystur, tí er ferðin størri, hevur førarin ikki nóg gott tamarhald á bilinum, hvørki við ella við ongum píkum.

Umframt at kanna bremsilongd á ísi, so varð eisini kannað, hvussu væl tey ymisku dekkini trekkja. Tað er ov rúgvusmikið at taka øll hesi tølini við her, men tað besta píkadekkið Nokian Hakkapeliitta 2 brúkti heili 7,1 sekund at koma frá 5 til 30 km/t og tað besta píkafría Nokian Hakkapeliitta Q brúkti 12,5 sekund. Við at finna gamla formulsavnið frá studentaskúlanum, eitt sindur av heilafimleiki og einari roknimaskinu, ið kann rokna ATAN, so kunnu hesar akselerationirnar leysliga umroknast til, at píkadekkið klárar niðan ígjøgnum eina brekku sum hellir uml. 5,5 stig og tað píkafría klárar eina brekku sum hellur uml. 3 stig. Hesar brekkurnar eru báðar so stuttar, at niðurstøðan má vera, at tað ber ikki til at koyra í brekkum, tá ið tað er blankur ísur, hvørki við ella við ongum píkum. Omaneftir klárar tað besta píkadekki eina brekku sum hellur uml. 14 stig og tað besta píkafría uml. 10,5 stig.

Tann síðsti teigurin vísur bremsilongd frá 60 km/t á vátum asfalti, sum hóast alt er tað vanligasta undirlagið. Her sæst, at summardekkið er fremst við Goodyear Ultragrip 6 beint í hølunum. Síðan koma tey týsku vetrardekkini. Píkadekkini og tey norðulendsku vetrardekkini liggja frá miðjuni og aftureftir. Taka vit munin á bremsilongd millum summardekkið og tað besta píkadekki Agi Sarek 2, so svarar hann til munin á bremsiførleika á ísi millum tað besta píkadekki og tað besta píkafría.

Hvørji dekk skulu vit so velja? Hetta er ein torførur spurningur at svara, tí nógv ymiskt spælir inn. Tíverri sær tað út sum um, at føroyskar dekksølur keypa tey dekkini, sum eru mest seld í Danmark, og danir hava ofta hug at skeita eftir hvat týskarar gera. Tí enda tey "týsku" dekkini í Føroyum. Tíverri, kann man siga, tí at í Danmark eru ongar brekkur, og har verður saltað væl. Tað sama kann ikki verða sagt um okkara vegakervi, og tí eru dekkini, sum norðmenn og sviar brúka betri skikkað her. Tað vísir seg eisini ofta, at dekksølurnar keypa píkadekk við ongum píkum, og selja hesi dekkini, tá ið fólk biða um píkafrí dekk. Tí síggja vit ikki tey bestu píkafríu dekkini her heima, sum t.d. Nokian Hakkapeliitta Q, Continental Conti Viking 3, Gislaved SoftFrost 2 og Bridgestone Blizzak WS-50. Tað er spell.

### Ráðini eru hesi:

Øll vetrardekk eru betri enn summardekk um veturin

Koyrið spakuligari, tá ið kavi er

Keypið ikki smalari dekk enn tey, sum bilurin er gjørdur til. Fyrimunurin við smølum dekkum í kava er næstan eingin, men ov smøl dekk kunnu vera vandamikil við 80 km/t á asfalti, serliga tey bleytu vetrardekkini.

Tey, sum helst *ikki* koyra, tá kavi er, kunnu t.d. ogna sær eitt dekk sum Goodyear Ultragrip 6, sum FDM valdi. Hetta kann eisini brúkast sum ársdekk.

Er neyðugt at koma fram í øllum veðri er valið eitt av teimum ordiligu vetrardekkunum, t.d. Nokian Hakkapeliitta Q, Gislaved SoftFrost 2 og Bridgestone Blizzak WS-50 ella kanska eitt Goodyear Ultra Grip 500 við ongum píkum, sum er sera gott í kava.

Samanumtikið kann sigast, at tann størsti vandin á kava og ísi er summardekk. Næstan eingin munur er á píkadekkum og píkafríum vetrardekkum longur, og munurin kann fáast burtur við at seta ferðina niður við 10 km/t, tá ið blankt gler er á vegnum. Vanliga tá ið kjakið fellur yvir á píkadekk, so byrja fólk at tosa hart og siga frá um einaferð tey í 1976 koyrdu í einari brekku, sum onkur annar ikki kláraði við ongum píkum. Men hevur tað nakran týdning, at hesi hava funnið eina brekku sum hellur millum 3 og 5,5 stig? Serliga tá hugsað verður um allar vansarnar við píkadekkum? Píkadekkini slíta strikur, gonguteigar og hávatenn av vegnum, so fólk ikki halda víkiskylduna, tey slíta spor í vegin, har vatn leggur seg og elvir til aquaplaning, dálka so nógv, at skelti ikki síggjast, bilrútar verða so skitnir at førarin ikki sær út og dustið elvir til astma. Størstiparturin av asfaltútreiðslunum stava frá píkasliti[12], og saman við strikuútreiðslunum er hetta 10-tals milliónir um árið. Vinningurin við píkadekkum er so lítil, at við atlitið til ferðslutrygd, so eru píkadekk púra óneyðug, og kanska beinleiðis skaðilig. Verulig ferðslutrygd fæst bert við at krevja, at koyrt skal vera við píkafríum vetradekkum í hálku, og mest loyvda ferðin verður sett niður. ■

| | | Summardekk | Píkafrí vetrardekk | Píkadekk |
|---|---|---|---|---|
| **Asfalt** | Fyrimunir | Nógv tað besta bæði til bremsing, trekking, aquaplaning og vending | Brúka minst bensin og larma minst | Fólk hoyra í góðari tíð, at tú kemur |
| | Vansar | Eingir | Slítast skjótari og koyrieginleikarnir er verri enn við summardekkum | Larma og brúka mest bensin. Píkarnir verða oyðilagdir av at koyra á asfalti |
| **Kavi** | Fyrimunir | Eingir | Góðar koyrieginleikar | Líka góð sum píkafrí dekk |
| | Vansar | Lat vera við at koyra við summardekkum í kava | Ferðin eigur at vera sett niður | Ferðin eigur at vera minkað |
| **Ísur** | Fyrimunir | Eingir | Bremsa uml. líka væl sum píkadekk | Eru eitt sindur betri enn píkafrí dekk |
| | Vansar | Lat bilin standa | Trekkja eitt sindur verri enn píkadekk, og ferðin eigur at vera sett nógv niður | Eingir, men ferðin eigur at vera sett nógv niður |

[1] http://www.daeksikkerhed.dk/sider/myndighedskrav.htm
[2] http://www.logting.fo/logir/1976.69.htm
[3] http://www.adac.de/Tests/Reifentests/Winterreifen/195_65_R15_T_2003_10/
[4] http://www.fdm.dk/altombiler/drift/daek/vinterdaek2003/195/skema.asp
[5] http://www.aftonbladet.se/vss/bil/story/0,2789,216827,00.html
[6] http://www.daeksikkerhed.dk/sider/myndighedskrav.htm
[7] http://www.dt.no
[8] http://nrk.no/nyheter/distrikt/nrk_ostlandssendingen/3045071.html
[9] http://www.aftenposten.no/nyheter/iriks/oslo/article.jhtml?articleID=632317
[10] http://www.aftonbladet.se
[11] http://www.motor.no/pdf/Vinterdekktest_2003.pdf
[12] http://www.vti.se

LES FREGNIR so ert tú altíð væl koyrandi